# sínum føroyska hjarta



Ludmilla var í Føroyum saman við Evu í 2002




Jógvan Johannesen sæst her saman við heimleysum dreingjum

*kundi halda jól við bestu gávu, hon kundi fáa – nevniliga sjálvt lívið. Læknarnir meta tað at vera mestsum eitt undur, at Eva er komin seg so væl.*

*Nýruni og livurin skulu nú fáast at virka aftur, men góðar vónir eru fyri hesum.*

## Eva hevur tað fínt

Vit kunnu nú gleða okkara lesarar við góðum tíðindum um Evu. Hon hevur tað fínt. Hon hevur nevniliga hitt nøkur av teimum, sum skipaðu fyri nevnda tónleikatiltaki. Eva er nú ein vøkur genta uppá 17 ár, sum gongur á miðnámsskúla.

Høvið til, at tey hittust var, at í heyst vóriu 15 ár liðin síðan Skandinavisk Børnemission byrjaði sítt virksemi í Ukraina. Í hesum sambandi varð skipað fyri eini ferð hagar. Við í ferðalagnum vóru 143 fólk, og av teimum vóru seks úr Føroyum. Millum hesi vóru eisini Beinta og Eiler Jacobsen, sum skipaðu fyri tiltøkunum í Føroyum fyri Evu. Umframt tey vóru hjúnini Mariann og M C Restorff og Kristina og Jógvan Johannesen úr Vestmanna.

Við sær hevði ferðalagið ein hóp av hjálparútgerð til sjúkrahús, barnaheim og fongsul. Millum annað høvdu tey við sær 34.000 pør av ullintum sokkum frá svenska herinum, sum munnu koma væl við í kalda vetrinum.

Tað var skipað fyri einum festkvøldi í einum sjónleikarhúsi, har tað vóru 3.000 fólk til staðar. Her var undirhald av øllum møguligum slag sum dansur og sangur. Talur vóru eisini hildnar eins og fólk, sum vóru hjálpt av tiltøkum hjá Skandinavisk Børnemission, komu upp á pallin at takka fyri hjálpina.

Tann mest kensluborna og hugtakandi løtan fyri føroyingar var, tá ið Eva kom upp á pallin saman við ommuni. Eva strálaði sum ein sól, og hon tyktist at hava tað fínt. Tey fingu høvi at hittast aftaná framførsluna. Tað var kanska ikki so nógv tosað, men tað var var hinvegin muss og klemm! Eva gongur sum sagt í skúla. Tað gongur eisini væl hjá henni, og hon hevði tað heilt gott. Hon og omman lótu heilsa í Føroyum, og tær takka fyri hjálpina, sum bjargaði hennara lívi.

Ein ungur maður prikkaði Beintu á akslarnar í sama við-



Vitjað var eisini á dagstovni fyri børn. Her hava tey latið seg í at taka ímóti gestunum

fangi. Hetta var hin hugtakandi harmonikuspælarin á konsertunum, sum vóru í Føroyum. Hann takkaði eisini fyri seinast.

Tey hittu eisini Tjernobylbørn, sum høvdu verið í Føroyum. Tey eru nú blivin vaksin. Hesi hugsaðu við takksemi um Sólvu í Skopun, sum hevði tikið so væl ímóti teimum, og sum hevði givið teimum upplivingar tey ikki gloyma. Tey lótu eisini heilsa í Føroyum.

Síðsta kvøldið var ein samkoma, har umboð fyri luttakandi londini á ferðini vórðu rópt upp at fáa eina viðurkenning fyri stuðulin til arbeiðið. Hetta var ein dropi á eini granitplátu. Fyri Føroyar vóru tað Beinta og Eiler Jacobsen, sum fingu hesa viðurkenning handaða.

## Vitjan í fongsli

Tað vóru annars fleiri vitjanir á ferðini. Ein av teimum var í einum fongsli. Beinta sigur, at tað var hart at síggja allar hesar ungu dreingir stuttkliptar og innisperraðar. Teimum er neyvan nakað at misunna. Fongsul har á leiðini er í hvussu er ikki nakað hvíldarheim, og so at koma út aftur. Tað verður ikki bert sum at siga tað.

Tað varð sungið fyri fangunum, so tey fingu hesa ljósglæmu í einum ikki ov bjartum dagligdegi.

Tað er eingin ivi um, at her er talan um eitt positivt millumtjóða samstarv, sum Føroyar eisini eru við í. Hvat betri kann vera enn at vera við til at bjarga lív!

Her eru framvegis nógvar uppgávur at loysa, so vónandi fara fólk at stuðla hesum verki eins dyggiliga og tey hava gjørt.